# Alternativið til tunnilin



Landsstýrið hevur júst sett ein tunnilsbólk at arbeiða við stóru útbyggingunum av føroyska veganetinum – millum annað undirsjóvartunnilin til Sandoyar. Sosialurin hevur fingið innlit í partar av arbeiðnum hjá bólkinum, og ein alternativur møguleiki til undirsjóvartunnilin er ein siglandi bussur, sum kann verða í pedulfarti millum Gomlurætt og Skopun.





# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Men vit geva tey ikki**
Vit hava lyftir til øll endamál
Lýsingaskelti í Havn

**Hví plaga tey annars at spara vatn?**
Fyri fyrstu ferð í mong ár noyðast fólk í Hovi at spara vatn orsakað av turki
Olivant

**Øhh, hvat við fiskaprísinum**
Fiskimenn mótmæla oljuprísinum
Olivant

**Allastaðni eru teir**
Pedagogar í Pakkhúsinum
Olivant

**Vónandi gongur betur hesaferð**
Høgni Hoydal á vitjan í Noregi
Olivant

**Vónandi ætlar hon ikki at renna til Scrabster**
Walisiska Rosie Swale-Pope kemur fyrsta dagin við Norrønu. Síðani oktober 2003 hevur hon runnið allan heimin runt. Frá Føroyum skal hon víðari til Scrabster.
Dimma

**Darwin fór skeivur**
Visti tú, at vespan fyrstu ferð varð sædd í Gundadali í 1999
Morgunsendingin í ÚF

# Henry ræðist Føroyar



Franski álopsspælarin Thierry Henry viðgongur, at hann umhugsar at gevast á franska landsliðnum eftir EM-endaspælið í summar. Onkur av brúkarunum av heimasíðuni nym.fo vil verða við, at tað kanska er orsaka av flogferðini til Føroya í fjør, tá ið franska landsliðið fekk ein harðliga lending. Frakland skal aftur til Føroya at spæla í næstu undankapping, og tað hevur kanska fingið Henry at umhugsa at gevast á landsliðnum.

# Okkara prinsessa



Innanlands

JOACHIM FEKK NÝGGJA KONU OG DANMARK NÝGGJA PRINSESSU

Tað er ivaleyst ein tulkingarspurningur, um kongshúsið er innanlandstíðindi í Føroyum ella ikki. Onkur vildi ivaleyst hildið, at hatta danska fjasið hevur einki við Føroyar at gera, men realistur vildi sagt, at kongshúsið er eisini kongshús fyri føroyingar. Dimmalætting er í øllum førum ikki í iva um, at kongaliga brúdleypið í Danmark farna vikuskiftið eru tíðindi, sum koma undir teigin "Innanlands". Sjáldan hevur "Innanlands" staðið við so stórum og bjørtum stavum í gomlu Dimmu.



# Hvar er bólturin

Spanski tennisspælarin Rafael Nadal sær lættari órógvaður út í hesari støðuni. Hann sær ikki út til at vita, hvar bólturin er, men hann var kringari í øðrum støðum, tí hann vann hendan tennisdystin ímóti Denis Gremelmayr 6-1, 6-0.